tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Nýggir tónar

## *Oddagrein*

Tað hevur nærum verið ógjørligt at viðgera nøkur ávís mál í Føroyum. Eitt er viðurskifti okkara við ES. Eitt annað er hernaðarmálið. Alt orðaskifti um hesi mál eru endað í skuldsetingum, og fólk hava víðgyrt seg í skotgrøvum. Tískil hevur verið trupult at taka avgerðir.

Kortini hevur eitt samt løgting einar tríggjar ferðir samtykt, at Føroyar skulu haldast uttan fyri allar hernaðarsamgongur. Fremstu talsmenn fyri hesa støðu hava verið Fólkaflokkurin í síni tíð og síðani Tjóðveldisflokkurin.

»Hervaldið av landinum« var eitt herróp hjá Tjóðveldisflokkinum líka frá 1960 - tá tjóðveldismaðurin Karsten Hansen stillaði upp til fólkatingsval við tí endamáli at fáa herstøðina av landinum - til Kalda krígggið var av. Flokkurin var klettafastur í hesi støðutakan, og tað hevur heldur ikki skortað við atfinningum móti øðrum flokkum.

Men hesa seinastu vikuna hava vit hoyrt nýggjar tónar. Formaður Tjóðveldisflokksins, Høgni Hoydal, sigur nú, at vit skulu viðgera spurningin og taka støðu til, um vit sum fullveldisríki skulu fara upp í samstarvið í einum felagsskapi undir Nato. M. a. verður ført fram, at vit skulu eisini hugsa um trygdina hjá grannum okkara.

Ein av fremstu grundevingunum at fáa Nato-støðina av landinum hevur verið, at Føroyar eru eitt bumbumál, tí í eini krígsstøðu fer eitt fíggindaland fyrst og fremst at bumba eina ávaringarstøð. Sum er hava Føroyar verið partur í eini ávaringarskipan. Henda skipan hevur sum fremsta mál at ávara USA móti einum møguligum álopi eystaneftir. Í grundini merkir tað, at vit liggja her við ávaringarstøðum uttan nakra sum helst verju. Skulu vit fylgja tankagongdini at vera ein partur í Nato, átti kravið so ikki at verið, at vit eisini høvdu eina verjuskipan?

Hetta er eitt viðbrekið mál, og flestu føroyingar vildu hava Nato- og loranstøðirnar av landinum, tí tær gjørdu, at vit vóru eitt bumbumál. Hetta varð ferð eftir ferð ført fram í friðartiltøkunum í 80'unum fyri at fáa ein enda á Kalda krígnum. Kríggið er av. Føroyar skulu kanska skipast sum fullveldisríki, og hetta krevur eina viðgerð. Men teir nýggju tónarnir hjá Tjóðveldisflokkinum um møguligan laimaskap í Nato munnu undra mong, hóast flokkurin ikki skal lastast fyri at siga seg sinnaðan at viðgera henda spurning. Higartil hava danir tikið avgerðina, men í framtíðini skulu vit sjálv taka avgerðina, um fullveldisríkisríkið Føroyar verður veruleiki. Men munnu flestu føroyingar ikki framvegis vilja, at vit eru uttan fyri allar hernaðarsamgongur?

***Sosialurin***

Lesarabrøv:

# Breiða semjan hjá løgmanni

Í »Krosskasti« mikukvøldið hin 3. mai í ár, hoyrdu vit enn einaferð løgmann greiða frá tí breiðu semjuni, sum hann segði vera ímillum stóru politisku flokkarnar í Føroyum.

Skilagott og við stórum álvarsemi vísti løgmaður á hvat flokkarnir eru samdir um, og um eg minniast rætt, so er hetta triðju ferð, at løgmaður alment vísir á hesa breiðu semju.

Men hvør er so henda semjan, sum løgmaður aftur og aftur vísir á?

Jú hann vísir til álitið hjá Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum í uttanlandsnevndini.

Løgmaður útgreinar sína hugsan nærri við orðarætt at lesa upp ávísan part av nevnda áliti og tað er soljóðandi:

*»Minnilutin mælir í staðin til, at samráðingar verða tiknar upp við ríkisstjórnina um eina nýggja skipan millum londini við greiðum valds- og ábyrgdarbýti. Eina skipan, sum greitt gevur Føroya Løgtingi evsta vald í yvirtiknum málum, og har ongar avmarkingar eru fyri, hvørji mál kunnu verða yvirtikin. Hetta ger Føroya Løgting av«.*



### Lesur álitið, en vil ikki nýta tað

Vit eru mong, sum stórliga undrast á hví løgmaður so ofta vísir á hetta skilagóða álitið hjá Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum, tá ið hann kortini als ikki vil gera brúk av tí, men heldur velur tjóðveldiskósina, sum gevur fullveldi og fulla loysing í einum taki.

Umrødda álit hjá Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum samsvarar eisini sera væl við nakað annað, sum løgmaður ferð eftir ferð vísir á, nevniliga tey 75% av veljarunum, sum siga nei til fulla loysing í einum taki, men sum heldur vilja venda aftur til tann spurningin einaferð í framtíðini, tá ið vit hava ment okkara egnu umsitingarligu og fíggjarligu førleikar.

Tórshavn, tann 03.05.2000
**Trygvi F. Guttesen**

# Kikaran á umhvørvið

*Vestmenningar hava av sínum eintingum minkað munandi um burturkastið, sum annars hevði endað á Brennistøðini hjá IRF. Hesum og øðrum umhvørvisætlanum verður greitt frá í fyrilestrum í Vestmanna*

Nevndin fyri viðarlundina í Vestmanna vil hava fólk at hugsa meira um umhvørvið og fara betur um náttúruna.

Týsdagin 9. mai eru 10 ár síðan tey fyrstu trøini vórðu gróðursett í viðarlundini í Vestmanna, og í tí sambnadi verður skipað fyri ymiskum tiltøkum í bygdini í komandi viku.

Á hvørjum ári hava næminganrir í 1. flokki í Vestmanna skúla gróðursett síni egnu trø. Fyrrapartin týsdagin 9. mai fara allir næmingarnir í skúlanum ein túr út í viðarlundina, har 1. flokkur fer at gróðurseta síni trø.

Aftan á fara øll inn í Ítróttarhøllina at fáa okkurt til matna og fyri tosta. Undirhald verður eisini í høllini.

9. og 10. mai verða almennir fyrilestrar í Miðhøllini í skúlanum. Dentur verður lagdur á, at lívrunnið tilfar fer aftur í jørðina ístaðin fyri at kokyra tað á brennistøðirnar.

Seinastu tvey árini hevur nevndin fyri viðarlundina í Vestmanna tikið ímóti greinum og runnum úr urtagørðunum hjá fólki og malið tað til spønir, sum verða nýttar at halda grasinum í viðarlundini burtur. Sum frá líður verða spønirnar samstundis til bestu mold.

Soleiðis hava vestmenningar av sínum eintingum minkað munandi um burturkastið, sum annars hevði endað í Brennistøðini hjá IRF.

Í fyrilestrum, sum verða í Vestmanna skúla í komandi viku, verður greitt frá arbeiðnum hjá viðarlundini og øðrum ætlanum at betra umhvørvið.



Fyrilestrarnir verða týskvøldið 9. mai og mikukvøldið 10. mai.

Finnbogi Joensen, formaður í nevndini fyri viðarlundini, leggur fyri týskvøldið kl. 19. Eyðu Elttør, landsstýrismaður í umhvørvismálum, greiðir frá hvørjar ætlanir landsstýrið hevur á umhvørvisøkinum. Durita Brattaberg, sum er umhvørvisleiðari í Bodø í Norra, sigur fra sínum royndum. Og Tóri í Hoyvík, býargartnari í Havn, greiðir frá royndunum við sankutø í Føroyum og Íslandi.

Mikukvøldið greiðir Suni Petersen frá umhvørvisarbeiðnum hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, har hann nú starvast. Til fyri kortum arbeiddi hann hjá IRF og hnn fer eisini at greiða frá ætlanunum hjá IRF at skilja rusknøgdirnar. Umboð fyri bygdarráðið í Vestmanna fer at greiða frá vetrarfriðingini í bygdini og hvørjar ætlanir kommunan hevur at verja umhvørvið. Uffe Bærentsen, sum arbeiðir hjá Enjo Føroyum í Vestmanna, fer at greiða frá reingerð uttan sápu.

Hósdagin er umhvørvið evnið í skúlanum. Og fríggjadagin fara næmingar og lærarar í Vestmanna at rudda alla bygdina.

Leygarkvøldið verður 10 ára føðingardagshaldið hjá viðarlundini hildið í Ítróttarhøllini.

†

Okkara kæra móðir, vermóðir, omma, langomma og olduromma

**SIGGA MALENA RASMUSSEN**
fødd Poulsen, Søldarfjørður
ættað úr Frammistovu í Hvannasundi

bleiv heimkallað 7. mai.

Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin 12. mai kl. 17. Jarðarferðin verður úr Elim í Søldarfirði leygardagin 13. mai kl. 13.

**Rosa, Sólrun, Jytta, Kirstin**
**Ingolf, Ragnar, Kristian og Sigurð**

Tey, ið vilja lata blómur ella kransar kunnu ístaðin lata eina gávu til Elim í Søldarfirði, konto í peningastovnunum.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri gávur, uppringingar, telegramm og blómur á gullbrúdleypsdegnum.

*Heilsan,*
**Kinna og Janus úr Dímun**



# Postverkið noytt at steingja

*Eingin peningur er eftir í kassanum hjá Postverki Føroya. Úrslitið hevur verið hálvatriðju millión verri í ár enn í fjør. Hetta merkir, at Postverkið ikki klárar summarið, uttan tað fær hjálp frá politiska myndugleikanum*

John Johannessen

Innan tríggjar mánaðir er kassin hjá Postverki Føroya púra tómur. Hetta hevur við sær, at virksemið hjá stovninum steðgar.

Hetta ásannar Bergur í Garði, postverksstjóri. Hann vísir á, at rakstrarúrslitið hjá stovninum er hálva triðju millión verri fýra teir fyrstu mánaðirnar í ár, enn tað var sama tíðarskeið í fjør.

Posverksstjórin sigur, at í 1999 hevði stovnurin eitt lítið yvirskot, men longu tá sá leiðslan, at tað fór at enda galið ár 2000.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Finnbogi Arge, er kunnaður um støðuna hjá Postverkinum. Tað varð hann longu í oktober í fjør. Og hann er greiður yvir, at avleiðingarnar verða álvarsligar, fær Postverkið ikki eina almenna peningainnspræning.

Men Finnbogi Arge ætlar sær ikki at biðja tingið um eykajáttan til Postverkið, fyrr enn hann er vísur í, at bygnaðurin fyri stovnin verður broyttur, so Postverkið kemur at líkjast einum partafelag.

### Grundarlagi fyri inntøkum fellur

Bergur í Garði, Postverksstjóri, sigur eina av orsøkunum hjá Postverkinum vera, at inntøkugrundarlagið hjá stovninum er alsamt fallandi. Postverkið er í harðari kapping við aðrar flutningstænastur, og merkist hetta væl á inntøkunum hjá stovninum.

– Eg vil ikki siga, at nýtslan av tænastum hjá Postverkinum er so nógv fallin seinastu árini, men nýtslan er avgjørt steðgað upp, og útlitini fyri, at hon aftur fer at vaksa eru ikki serliga bjørt við verandi bygnaði, sigur Bergur í Garði.

Ein onnur orsøktil vánaliga úrslitið er lønarsáttmálin frá í fjør. Lønarsáttmálin hjá postboðunum kostar Postverkinum fýra til fimm milliónir meira um árið, enn tann gamli sáttmálin gjørdi. Og Postverkið fær einki endurgjald frá landsins myndugleikum fyri lønarsáttmálan, eins og sjúkrahúsverkið og aðrir stovnar fáa.

### Tørvur á íløgum

Allar íløgur hjá Postverki Føroya verða goldnar yvir raksturin. Men trupulleikin hjá Postverkinum er, at eingin peningur er eftir til íløgur, tá raksturin er goldin. Tískil hevur Postverkið í dag ein ógvuliga stóran tørv á íløgum.

Bergur í Garði sigur, at tað, at Postverkið ikki er sloppið at gera íløgur, hevur havt við sær, at Postverk Føroya í veruleikanum er niðurslitið og forfallið. Postverkið hevur ikki, eins og onnur posverk, havt møguleika at fara upp í KT-vinnuna og gjøgnum hana bjóða út tænastur til vinnulívið, eins og postverk aðrastaðni í heiminum.

Hetta heldur Bergur í Garði vera ein stóran smeit fyri Postverkið, tí tað júst av hesi orsøk ikki hevur somu inntøkumøguleikar sum postverk aðrastaðni í heimi.

### Krevur nýggjan bygnað

Bæði landsstýrismaðurin í vinnumálum og postverksstjórin eru samdir um, at Postverk Føroya má hava nýggjan bygnað.

Postverksstjórin heldur, at vit mugu fáa eina skipan, ið inniber, at Postverkið í størri mun kann arbeiða sum eitt sjálvstøðugt felag. Hann vísir í hesum sambandi á, at Postverk Føroya er einasta felag í Norðurlondum, ið ikki arbeiðir sum eitt sjálvstøðugt felag, men harafturímóti er heft at politiska myndugleikanum.

Kortini vil postverksstjórin ikki vísa á nakra ítøkiliga loysn fyri Postverkið. Hetta heldur hann vera eina politiska støðutakan, ið hann ikki skal blanda seg uppí.

Finnbogi Arge, landsstýrismaður í vinnumálum, sigur seg fara at krevja ein nýggjan bygnað fyri Postverkið. Hann vísir á, at hann sjálvur hevði dámt best, um Postverkið gjørdist sjálvstøðugt felag, men at onnur heldur ynskja eina millumloysn, soleiðis, at Postverk Føroya fær nøkulunda sama bygnað sum Post Danmark.

### Viðgerast í landsstýrinum mánadagin

Landsstýrið hevur leingi vitað, at tað stendur illa til hjá Postverki Føroya. Tí hevur støðan hjá stovninum eisini verið viðgjørd á fleiri landsstýrisfundum seinastu tíðina. Men nú, postverksstjórin hevur boðað landsstýrismanninum í vinnumálum frá, at Postverkið ikki klárar summarið, verður akutti peningatørvurin viðgjørdur á landsstýrisfundi komandi mánadag.

Finnbogi Arge roknar kortini ikki við, at málið um Postverkið verður avgreitt í bræði. Hann væntar, at tað fer at verða neyðugt at kalla tingið saman í summarfrítíðini at viðgera støðuna hjá Postverkinum.



*Akutti peningatørvurin hjá Postverkinum skal viðgerast í landsstýrinum mánadagin*

# Havnarfólk fara til Suðuroyar at ganga

Áki Bertholdsen

Sunnudagin verður skipað fyri stórari gonguferð í Suðuroynni.

Tað er Tórshavnar Gongufelag, sum ætlar sær at royna ta gomlu bygdargtuna úr Hvalba, upp ígjøgnum Káragjógv, til Tvøroyrar.

Men tey vóna sjálvandi eisini, at so nógvir suðuroyingar, sum til ber, sum fara at nýta hetta høvið til ein frískligan gongutíur eftir fjøllunum.

Byrjað verður í Hvalba beint eftir døgverða sunnudagin, akkurát nær, farið verður, verður lýst í Lýsingatorginum her í blaðnum.

Tað verða eisini plakatir hongdar upp ymsastaðni í oynni, sum siga frá, nær farið verður.

Tað einasta, sum er vist, tað er, at tað verður farið.

Hjá Tórshavnar Gongufelag er nevniliga onki sum eitur „um tað viðrar“, tí tey siga, at farið verður í øllum veðri, so er bara at lata seg í eftir umstøðunum.

Hetta er ein miðal strævin gongutúrur, sum tekur einar tríggjar tímar.

Nú er tað gjørt nógv lættari at fara hendan túrin, tí í fjør eru skelti sett upp, sum vísa, hvønn veg gangast skal upp á fjallið.

**www.sosialurin.fo**

